## Miðlar

Dagfinn Olsen



# Caffe latte, lætt te, ella bara ein lætti

Fleiri glottar hava verið í føroyska miðlaheiminum farnu vikuna. Eg detti annars, eins og onnur, skjótt í grøvina við neiligum orðum, tá ummælast skal, men rættast er sjálvandi at geva rós, har tað er uppiborið.

Og eg horvi eisini til teirra, sum leggja stóran dent á Kringvarpið, og dygdina har, tá ummælast skal, tí hetta er eitt alment flaggskip (ið vit eisini øll gjalda). Gamaní, eitt flaggskip, ið av og á tykist at sigla vandasjógv, men sum tó tykist hava eina hóming av, hvar rætta kósin var.

Lívið gerst ikki altíð lættari við árunum, og hetta meti eg at ein stovnur sum Kringvarpið sannar. Miðlaheimurin broytist, kappingin frá m.a. Rás 2 manningini er óivað hørð til tíðir. Har tykjast tey ofta eitt sindur mobilari, skjótari, og ikki minst "frískari", og hetta síðsta fangar heilt víst ávísan lurtarabólk.

Men netsíðan hjá Kringvarpinum er við at koma á pláss, ...og tó! Tað eru dagar, har tíðindastubbarnir ikki koma út. Og ynskiligt var, at enn meira verður gjørt við netvarp, tí hetta er heilt víst framtíðin. Eg skuldi t.d. í samband við hesa ummælisgrein fara at hyggja at Refleksjón, tí eg havi sjálvur ummælt tónleik, og nú t.d. miðlar, so evnið hesaferð var mær viðkomandi. Men enn er sendingin ikki tøk á netinum!! Tíverri!

Men hinvegin er t.d. Dagur og Vika oftast skjótt tøk, og eisini Fólksins Rødd.

Og tað var av sonnum aftur hesaferð ein gleði at síggja hesa sending, sum varepaði ljós á bygda- og býarmentalitetin í Føroyum. Eg havi nú altíð hildið, at Havnin er ikki so stór, at (bygda)fólk í Havn nýtast at fáa stórbýarkenslur, fyri tað um tey gerandisdagar ferðast eftir Áarvegnum, ella keypa sínar skundverðar í SMS ella á Sushibarr. Haldi at Teitur hevði rætt tá hann sang: Havnin er ein lítil bygd.

Men Fólksins Rødd megnaði at lýsa fleiri síður, og óivað er kjak heima í stovunum kring landið um, hvørt ein kann liva uttan cafélív og Caffe Latte, ella um ein temunnur heima hjá kenningum við eitt køksborð er líka stórur lætti í annars ferðmikla gerandisdegnum. Eitt kjak, ið eigur at takast upp í einum landi, har nýtiknir havhestaungar á seinsummri verða seldir fyri okursprís á bryggjuni í høvuðsstaðnum, beint við meldurin av bilum, ølstovum, caféum og gistingarhúsum við pizza og brunch.

Og við Jógvani Arge sum upplesara varð prikkurin settur yvir i'ið. Super!!

Bløð og portalar tykjast fylgja og passa seg eftir framtíðini, har alt er snøggari, skjótari og betri. Miðlameldurin heldur fram, men tó kann ein bert geva teimum rætt, sum halda nakað nógv vera av fótbólti og innantómum greinastubbum um slankikurar, meðan lítið haldgott er um týðandi mál úti í heimi, t.d. stóra brølaran hjá Gordon Brown, nú valstríð hevur verið upp á tað harðasta í Bretlandi.

Ofta tykist, sum eru vit púra eina í eini ostaklokku, fyri nú at halda okkum í café-umhvørvinum.

*mikudagsblaðnum ummæla skiftandi fólk fjølmiðlarnar.*

# Húsini dømd til niðurrívingar

**ELDUR Eini eldri hús í Sørvági fóru týskvøldið so illa av eldi, at tey neyvan verða til hús aftur**

Randi Jacobsen



*Húsini vóru eitt stórt bál*

*Mynd: Vágaportalurin*

Ein ungur maður var einsamallur heima í húsunum í Sørvági týskvøldið.

Hann fór at gera sær mat í eini friturugrýtu og fór so upp á loftið.

Knappliga merkti hann, at tað var gali í køkinum, har eldur var komin í, og hann fór at spræna vatn á, men tað gjørdi bara ilt verri.

So kom ein granni við eini vatnslangu, og tað gjørdi tað heldur ikki betri.

Ein trupulleiki var, at teir báðir menninir ikki skiltu hvør annan, við tað at tann ungi maðurin var av útlendsku uppruna.

Mamma hansara og maður hennara vóru ikki komin heim frá arbeiði enn, tá ið eldur kom í.

Húsini eru farin so illa, at alt er brunnið innan úr teimum. Útveggirnir vóru stoyptir, og betongið toldi heldur ikki tann nógva hitan. Húsini verða tí heldur niðurrivin, sigur politiið í Vágum.

Húsini vórðu frá umleið krígsárunum.

*randi@sosialurin.fo*

# Eggjar øllum til at fríðka í bygdunum

**UMHVØRVI Fríðkanarátakið í Eysturkommunu fevnir umframt um vakrasta urtagarð, um best røkta úthús, best best røkta fjós og best røkta seyðhús. Endamálið er at fáa alt umhvørvið í bygdunum vakurt, sigur Ingi Hansen, trvnaðarleiðari**

Randi Jacobsen

Eysturkommuna hevði í fjør eitt fríðkanarátak við endamálinum at stimbra og eggja borgarum og vinnulívi til at gera meira við at fríðkað umhvørvið.

Í fjør fevni átakið um vakrasta urtagarð, best røkta neyst og best røkta fyritøku.

- Vit sóu týðiligan mun í fjør, at fólk løgdu seg meira eftir at fríðka. Tltakið fekk fleiri fólk at fara út at rudda og hampa um húsini.



*Tá ein ein familja ger ein vakran urtagarð, fáa onnur hug at gera tað sama. Men vakurt umhvørvi fevnir um neira enn urtagarðar*

Neystini vórðu tikin við, tí nøkur neyst stóðu, sum kravdu eina bøtandi hond, og hetta var ein roynd at geva eigarunum at spark at koma í gongd við at seta neystini í stand.

Í ár fevnir átakið um urtagarðar, úthús, fjós og seyðhús.

### Alt umhvørvið

– Tað hava vit gjørt, tí tey húsini eru partur av umhvørvinum, og vit vilja eggja fólki til eisini at hampa um úthúsini, sigur Ingi Hansen, trivnaarleiðari í Eysturkommunu.

Tiltakið er skipað sum kapping, har tríggir vinnarar í hvørjum átaki fáa virðisløn og eina plátu at seta á ognina. Onnur, sum eisini hava gjørt eitt gott arbeiði, fáa skreytblað sum herðaklapp.

Dómsnevndin fer út at gra sínar metingar, áðrenn alt følnar, og í august verða virðislønirnar handaðar á eini samkomu í tilhaldinum Gøtubrá.

### Útivika

Eysturkommuna hevur somuleiðis tikið stig til at hava eina útviku, sum verður frá 24. til 30. mai.

Tá er ætlanin hvønn dag at skipa fyri longri gongutúrum á fjøllunum, og kend frásøgufólk verða við á hesum túrum.